# Útlendsk listafólk í Listaskálanum



*Ein av málningunum, sum verður at síggja í Listaskálanum frá leygardegnum*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Leygardagin letur ein nýggj listaframsýning upp í Listaskálanum í Havn. Tað eru trý útlendsk listafólk saman við føroyinginum Hansinu Iversen, ið saman fara at sýna fram**

LISTAFRAMSÝNING
*Stefan í Skorini*

Tey fýra listafólkini fara fyrst og fremst at sýna fram málningalist, sum tey hava arbeitt við. Listafólkini eru øll í tí yngra endanum á aldursstiganum, og tey eru um tretivu ára gomul.

Listafólkini eru Mini Blume, Kathleen Toft og Peter Bjørn Franceschi umframt Hansinu Mariu Iversen, sum er málari. Útbúgving hevur hon tikið á Handiðaskóla Íslands og Bildkonstakademin í Helsinki í Finnlandi.

Hansina er eitt av teimum ungu listafólkunum, sum fólk hava stórar vónir um. Hon gongur aðrar leiðir enn tær, ið hava eyðkent myndlist okkara tað seinasta ættarliðið. Vónandi verður hon ímillum teirra, sum fara at geva føroyskari málningalist nýtt andlit.

Í 1997 fingu Mini Blume og Kathleen Toft legat frá Dansk-Færøsk Kulturfond til eina Føroyaferð, og »tær hava valla tosað um annað síðani«, sigur Hansina.

Mini Blume hevur norskan og danskan uppvøkstur. Hon er málari og grafikari og er útbúgvin á Listaakademinum í Keypmannahavn.

Kathleen Toft er málari. Hon er eisini útbúgvin í Keypmannahavn og sigur seg vera hugfangað av føroysku náttúruni.

Peter Bjørn Francheschi er glarlistamaður og málari, sonur gitna franska fotografin Gérard Francheschi, ið tók nógvar myndir í Føroyum í 1970-árunum. Peter Bjørn sigur seg kenna Føroyar ígjøgnum hesar myndirnar.

Henda framsýningin letur upp leygardagin kl. 16.00, og nú verður várframsýningin tikin av aftur skránni.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi og sum fráliður regn. Hitin millum 2 og 5 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og suðri og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 3 og 6 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 4 og 7 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Fyrst stívt andøvsgul upp í hvassan vind av eystri og regn og hitin millum 4 og 7 stig. Seinni upp í ein strúk av vestri og ælingur, men eisini sólglottar. Eitt sindur kaldari.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷19 |
| Nuuk | ÷10 |
| Qaqortoq | ÷1 |
| Ammassalik | ÷4 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 0 |
| Seyðisfjørður | 0 |
| Tórshavn | 2 |
| Lerwick | 2 |
| Aberdeen | 4 |
| London | 8 |
| Tromsø | ÷4 |
| Bergen | 5 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 6 |
| Keypmannah. | 3 |
| Helsinki | 2 |
| Moskva | ÷2 |
| Berlin | 3 |
| Warzawa | 3 |
| Kiev | 3 |
| Bukarest | 0 |
| Paris | 9 |
| Madrid | 13 |
| Róm | 17 |
| Malorca | 18 |
| Athen | 20 |
| Malta | 20 |
| Tunis | 26 |
| Beijing | 13 |
| New Dehli | 30 |
| Bangkok | 35 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 20 |
| New York | 6 |
| Miami | 24 |
| Los Angeles | 16 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | – |
| La Paz | 21 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 21 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 977 hPa. sunnan fyri Hvarvið fer í landnyrðing.




Lágtrýstið í útsynning úr Íslandi fer spakuliga í landnyrðing og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum fríggjadagin.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 28/03 kl. 06⁰⁰–29/03 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 2,1°
Minsti hiti máldur í mars: ÷8,7° Mesti hiti máldur í mars: 12,0°

### AVFALLIÐ




Avfallið: <0,1 mm – mált frá 28/03 kl. 06⁰⁰–29/03 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í mars: 51,3 mm

### VESTFALLSKYRRINDI

20. mars: Mánin longst frá jørðini
25. mars: Tendring
1. apríl: Fyrra kvarter
5. apríl: Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2001

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 30. mar | 11.26 | 23.50 | 10.26 | 22.50 | 10.41 | 23.05 | 01.02 | 13.26 | 02.02 | 14.26 | 09.41 | 22.05 | 08.41 | 21.05 | 11.41 | — | 00.17 | 12.41 | 11.11 | 23.35 | 00.02 | 12.26 |
| 31. mar | — | 12.16 | 11.16 | 23.42 | 11.31 | 23.57 | 01.50 | 14.16 | 02.50 | 15.16 | 10.31 | 22.57 | 09.31 | 21.57 | 00.05 | 12.31 | 01.05 | 13.31 | — | 12.01 | 00.50 | 13.16 |
| 1. apr | 00.42 | 13.23 | — | 12.23 | — | 12.38 | 02.42 | 15.23 | 03.42 | 16.23 | 11.38 | — | 10.38 | 23.19 | 00.57 | 13.38 | 01.57 | 14.38 | 00.27 | 13.08 | 01.42 | 14.23 |
| 2. apr | 02.04 | 14.45 | 01.04 | 13.45 | 01.19 | 14.00 | 04.04 | 16.45 | 05.04 | 17.45 | 00.19 | 13.00 | — | 12.00 | 02.19 | 15.00 | 03.19 | 16.00 | 01.49 | 14.30 | 03.04 | 15.45 |